HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

23. februar 2016
Mál: 16/00298-1
Viðgjørt: Hilmar Høgenni

**Reglugerð**
**fyri**
**veiting av stuðulsjáttan til útoyggjamenning**

Við atliti at stuðulsjáttan 11.37.2.19 Stuðul til útoyggjamenning, verða hesar leiðreglur ásettar:

## Endamál

§ **1.** Endamálið er at stuðla tiltøkum í útoyggjum, sum eru mennandi fyri hesar. Útoyggjar, sum koma undir hesa skipan, eru: Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

## Stuðulstreytir

§ **2.** Stuðul kann veitast einstaklingum, virkjum, feløgum og kommunum.
*Stk. 2.* Stuðulin skal í minst møguligan mun virka kappingaravlagandi.

## Stuðul til serligt endamál

§ **3.** Er stuðul settur av til serligt endamál í viðmerkingunum á fíggjarlógini, skal henda upphædd nýtast til ásetta endamál.

*Stk. 2.* Er stuðul settur av uttan nærri endamál, kann Heilsu- og innlendismálaráðið gera av, um stuðulin skal nýtast til serligt endamál, um mett verður, at tað er átrokandi at stuðla innan ávíst øki.

## Umsókn

§ **4.** Lýst verður eftir umsóknum í bløðunum og á heimasíðuni hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum. Freistin at søkja er 1. februar í stuðulsárinum, uttan so at tað er lýst við aðrari freist á heimasíðu ráðsins og í bløðunum.

*Stk. 2.* Umsóknir skulu skrivast á oyðublað "Umsóknarblað til stuðul av játtanini til útoyggjamenning", sum er tøkt á heimasíðu Heilsu- og innlendismálaráðsins. Oyðublaðið fæst eisini við at venda sær til ráðið.

*Stk. 3.* Umsókn skal vera grundað á fíggjarætlan fyri árini, ið verkætlanin fevnir um. Eisini skulu átøk og virksemið fyri stuðulsárini verða lýst.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

**Játtan**

**§ 5.** Játtanin verður latin, um stuðul er til taks á fíggjarlógini, konto 11.37.2.19.
*Stk. 2.* Játtan av umsóknini verður latin við grundarlagi í umsóknini, í seinasta lagi tveir mánaðir eftir at freistin at søkja er farin.
*Stk. 3.* Heilsu- og innlendismálaráðið tilskilar sær rætt til, um tað verður mett neyðugt, at senda umsóknina til ummælis hjá fakliga serkønum.
*Stk. 4.* Heilsu- og innlendismálaráðið kann krevja upplýsingar um innlit í arbeiðsgongdina, og hvussu peningurin verður nýttur í verkætlanarskeiðinum.
*Stk. 5.* Verður øll játtanin ikki nýtt í fyrsta umfari, ella um játtaður stuðul fellur aftur, verður lýst eftir fleiri umsóknum við nýggjari umsóknarfreist.

**Útgjald av stuðul**

**§ 6.** Stuðulin verður latin sambært treytunum í hesu reglugerð og játtanarlóg landsins. Stuðulin verður útgoldin sambært rokning, fyribils verkætlanarroknskapi ella endaligum roknskapi frá grannskoðanarvirki.
*Stk. 2.* Er ikki av álvara farið undir arbeiðið, sum hevur fingið játtað stuðul, áðrenn eitt hálvt ár eftir, at stuðulin er játtaður, fellur tilsøgnin burtur, um ikki annað er avtalað við Heilsu- og innlendismálaráðið.
*Stk. 3.* Lýkur stuðulsmóttakarin ikki longur treytirnar fyri at fáa stuðul, ella ikki er førur fyri at fremja avtalaða virksemið á nøktandi hátt, detta tilsagnirnar burtur, og útgoldin stuðul eigur at verða kravdur afturgoldin í síðsta lagi við árslok árið eftir, at tilsøgnin varð givin.
*Stk. 4.* Útgoldin stuðul kann eisini verða kravdur afturgoldin, um avlop er í mun til avtalaða virksemið.

**Fíggjarætlan, roknskapur og grannskoðan**

**§ 7.** Fíggjarætlan, sum verður løgd saman við umsókn, skal lýsa væntaðar inntøkur og útreiðslur.
*Stk. 2.* Roknskapur fyri stuðulsárið skal lúka treytirnar sambært §§ 21 ella 22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.
*Stk. 3.* Grannskoðaður ársroknskapur fyri veittan stuðul skal vera latin Heilsu- og innlendismálaráðnum í seinasta lagi 1. apríl árið eftir.
Stk. 4. Hóast stk. 3 kann fyri stuðul, sum einans verður veittur eina ferð, og sum er minni enn 100.000 kr. í staðin fyri grannskoðan roknskap latast Heilsu- og innlendismálaráðnum frágreiðing í seinasta lagi 1. apríl árið eftir.

**Gildiskoma**

**§ 8.** Hesar reglur koma í gildi beinanvegin. Samstundis fer reglugerð fyri útoyggjastuðul frá 18. mars 2014 úr gildi.

Heilsu- og innlendismálaráðið, 23. februar 2016

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Turid Arge
aðalstjóri